
BARNA-SIÐAN




Loysnir frá seinastu barnasíðu:

a) Langomma er 95 ár
b) Nr. 2 fekk ísin.



TAKK FYRI TEKNINGINA TIL VÁR (9 ár)



Veitst tú,

hvussu tað eitur, tá ið vindurin blæsur so og so nógv — og hvussu sjógvurin tá sær út?

Vindmegi:

m. pr. sek.	eitur	Nakrir háttir at meta vindmegina eftir á sjónum
0	Logn/stilli	Havið spegilsblankt
0—1	Lítið lot	Ein farri vísir, hvaðan fleyrið kemur
2—3	Lot	Smáir vindgarðar vísa týðuliga ættina
4—5	Gul	Vindgarðar byrja so smátt at hvítna
6—7	Andøvsgul	Stór fløgg strekkjast og vindgarðar hvítna dúgliga
8—10	Stívt andøvsgul	Vindaldan meðalstór og samanhangandi við hvítum ryggi
11—13	Strúkur í vindi	Tað byrjar at hvína í loftræðrum. Stórar hvítryggjutar aldur
14—17	Hvassur vindur	Møðsamt at ganga ímóti ættini. Skúm frá brótandi vindaldu byrjar at fúka eftir sjónum
18—20	Skrið	Tað byrjar at taka leyst. Torført at ganga ímóti ættini
21—24	Stormur	Glaðustrok, stórur sjógvur, sum byrjar at bróta, havið tætt av skúmfroðu.
25—28	Hvassur stormur	Ógvuliga stórur sjógvur, sjógvurin næstan allur hvítur
29—32	Kolandi stormur	Skaðavindur, allur sjógvurin hvítur frá stórum brotasjógvi
yvir 33	Ódn	Himmal og hav alt í einum roki. Ógvuliga sjáldan í Føroyum

LOYNIHELLIÐ

eftir *J. M. Neale*

Eitt marghættligt bræv

12. partur:

Allur dagurin eftir gekk, uttan at nakað hendi. Nú var aftur kvøld, og tað myrknaði skjótt. Difilus hongdi aftur kamelullar-frakkan fyri hellismunnan. Tey tendraðu ein kyndil og settust at fáa sær náttúrða.

»Nú er myrkt, harri, so eg átti helst at farið eftir vatni«.

»Tað er helst betri at drála við tí ein dag afturat, Difilus, tí rómverjar eru ivaleyst enn í námindum...«

Eitt hvøit skriggj! — Ekkóið fór millum fjøllini.

»Sløkk ljósið!«

Eitt brast ímóti tí tjúkka forhanginum við hellismunnan. Tey sótu øll nábleik. Basilius og Difils vóru teir fyrstu, ið komu fyri seg aftur.

»Hvat mundi hatta vera?«

»Kanska ein steinur, harri, ella ein pílur — eg fari at vita!«

»Men ver varin, Difilus, ógvuliga varin!«

»Beint nú er ongin vandi, harri. Um so rómverjar hava funnið okkum, so veit eg í hvussu er ikki, hvussu teir skuldu sloppi inni higar!« Spakuliga grulvaði Difilus fram. So varisliga, at hann ikki gjørdi óljóð. Tá ið hann kom fram í munnan, trilvaði hann eftir øllum forhanginum. — Har — júst sum hann hevði væntað! — Ein pílur stóð hálvur inn í gjøgnum frakkan.

Difilus royndi at toga hann úr. Men hvat var hatta? — Hann hugdi út um frakkan at vita, hví hann ikki fekk togað pílin inn igjøgnum. Eitt pappírspetti sum ein hond til støddar var skorðað fast í eina rivu í hinum endanum á pílinum. Varisliga tók hann pappírið og lurtaði imeðan eftir ljóðum úr neðra.

Alt var kvirt. Kolamyrkt var eisini. Einki var at siggja til mannin, sum skotið hevði.

So vandaliga dró Difilus frakkan fyri aftur hellismunnan og kreyp so ljódliga inn aftur á botn í hellinum.

»Eitt bræv, harri!« teskaði hann. »Skotið inn í hellið við einum píli!«

»Eitt bræv?«

Bilsin komu øll yvir til hansara.

»Munnu vit kunna festa í aftur kyndilin?«

»Jú, tað hugsi eg, tí í gjár sást einki til nakað ljós, tá ið forhangið var fyri.

Kyndilin logaði aftur. Difilus rætti harra sínum skrivið: Eitt gulnað pappír, lagt leysliga saman, eitt sindur skrætt í kantinum, uttaná stóð: »Til háttvirda Basilius«.

Basilius hugdi gjølla at brævinum. Hugsunarsamur læt hann brævið upp:

Silvanus, biskupur, heilsar Basiliusi, elskaða soni sínum í Harranum.

Vit lata teg hervið frætta, at háttvirdi bróðir okkara, Aristides, vegna ta ræðuligu atsókn móti kirkjuliðunum allastaðni, og helst her á leið, hevur tikið ta avgerð at flýggja út í oyðimørkina, inntil tann tíð kemur, at hann óræddur kann koma heimaftur.

Vit líta hann í tína varðveitslu og biðja teg geva honum hús og mat og hvat honum annars tørvar. Gud veri við tær!

Ombi, tann 10. dag Hamlés (179).

»Vit lora stigan niður beinanvegin, pápi!« rópti Jóhannes og leyp yvir at jarnkongunum til stigan. »Difilus hjálpir tær!«

Tað bar til at gera stigan fastan í kongarnar uttan at taka forhangið burturfrá.

»Sløkk ljósið!«

»Bíða eitt sindur, Jóhannes!«

Drongurin hugdi upp.

»Eitt hundrað og sjeyti og níggju ...« mutlaði Basilius. »Eitt hundrað og sjeyti og níggju.«

»Hvat er á vási?«

»Eg skilji ikki hatta talið. Her er nakað, sum ikki ruggar rætt!«

»Hvussu meinar tú! — Er hetta kanska ikki skriftin hjá Silvanusi?« spurdi móðirin bangin.

Framhald